# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samkipað sjúkrahúsverk

Spurningurin um, sjúkrahúsbygnaðin er aktuellur. Avgerðin um at seta heilsustjóra hevur elvt til ein ótta fyri lagnuni hjá teimum smáu sjúkrahúsunum. Hetta merkir, at onkur hevur hug at andøva ímóti hesari avgerð. Støða landsstýrismansins tykist púra greið: vit skulu skipa okkara sjúkrahúsverk gagnligt og skilagott fyri allar landsins borgarar – tað vil siga, eisini við hjartanum. Hetta tænir øllum borgarum landsins best.

Hetta er greið tala og kann bert merkja, at vit skulu varðveita trý sjúkrahús í Føroyum, soleiðis sum ásett í galdandi sjúkrahúslóggávu. Tað, sum umræður er, at vit fáa samskipan og samstarv í lag millum tey trý sjúkrahúsini og á tann hátt fáa sum mest burtur úr tí tilfeingi, sum er í heilsuverkinum. Partarnir skulu virka saman heldur enn at kappast móti hvør øðrum, heldur landsstýrismaðurin. Vit hava her fleiri ferðir mælt til, at hugt verður nærri at bygnaðinum og virkseminum á teimum trimum sjúkrahúsunum. Hetta mál eigur at verða viðgjørt við støði í teimum stóru broytingum, sum seinastu mongu árini eru hendar innan føroyska undirstøðukervið. Fyri bert fáum ártíggjum síðan vóru at flestu farleiðir sjóvegis, meðan støðan í dag er tann, at meginparturin av landinum er bundin saman við føstum sambandi. Tað vildi verið bæði ábyrgdarleyst og stuttskygt ikki at gagnnýtt teir møguleikar fyri rationaliseringum og fullnýtslum, sum hetta nógv broytta undirstøðukervi gevur.

Hvussu skulu vit so sera sjøtul á hetta stóra og sera torføra mál? Svar landsstýrismansins er, at vit skulu skipa sjúkrahúsverkið við skili - og við hjarta. Hetta merkir, at vit ikki skulu lata okkum stýra av køldum roknimeistarum og rationaliseringsekspertum – tí so endar alt virksemið í høvuðsstaðnum. Sostatt kenna vit nú politisku fortreytirnar, sum eru, at vit í alla framtíð skulu varðveita trý sjúkrahús í hesum lítla landi. Til tess at tryggja, at tilfeingið á øllum trimum sjúkrahúsum verður gagnýtt á besta hátt, skal økið samskipast og hetta skal eftir øllum at døma gerast við at seta ein felags heilsustjóra at samskipa alt heilsuverkið og í hesum føri serstakliga sjúkrahúspartin.

Hesin nýggi stovnur skal ikki stýra lokalsjúkrahúsunum í smálutum, men yvirskipað ansa eftir, at hesi fáa ein greitt ásettan leiklut og halda seg til hendan leiklutin. Tey skulu vera nærsjúkrahús og skulu kunna átaka sær nýggjar uppgávur, m.a. í fólkaheilsupolitiskum høpi, og t.d. sum miðdeplar í eini landsfevnandi skipan fyri rehabilitering í Føroyum. Vónandi merkir hetta, at vit í framtíðini sleppa undan dupultfunktiónum og at Landssjúkrahúsið skal vera meginsjúkrahúsið í Føroyum. Ein tílík skipan kemur ikki við einum heilsustjóra eina, tí hetta er politikkur, ikki fyrisiting. Skipanin krevur greið heilsupolitisk mál, greiðar politiskar útmeldingar, sterka fígging, politiska uppbakking, dirvi og handalag. Hesar fortreytir tykjast nú at vera til staðar og tí er at smíða, meðan jarnið er heitt.

**Sosialurin**

## S.O.S listi B

**BÁRÐUR SIMONSEN**
sambandsmaður í Havn

**So er kommunuvalið 2008 farið aftur um bak, og ikki kann sigast annað enn, at ein situr við nógvum spurningum og tankum eftir hetta val**

Á kommunuvalinum 2004 gjørdi listi B-Sambandsflokkurin onki serligt val. Flokkurin fekk bert 1899 atkvøður, ið er 18%. Av hesum fekk Heðin Mortensen 667 persónligar atkvøður, hann fekk nógv flestar atkvøður á sambandslistanum. Flokkurin var minkaður nógv í mun til valið í 2000, tá fekk flokkurin 2353 atkvøður, ið er 25%. Heðin Mortensen fekk 630 persónligar atkvøður og gjørdist toppskorari fyri flokkin.

Profilurin hjá Sambandsflokkinum, Heðin Mortensen, stillaði fyrstu ferð upp til kommunuvalið fyri Sambandsflokkin í 1988 og kom inn fyri flokkin saman við Lisbeth Petersen. Ikki kann sigast annað enn, at hetta varð eitt kupp fyri Sambandsflokkin at hava fingið Heðin á listan. Hann varð jú ein gomul rotta innan kommunupolitik, hann kom inn í býráðið fyrstu ferð í 1972, maðurin var ein sannur stemmuslúkari.

At Heðin Mortensen var ein stemmuslúkari hóvaði kanska ikki øllum í Sambandsflokkinum. Gamli klanurin í Suðurstreymi og aðrar kreftir í Sambandsflokkinum tóku fegin ímóti atkvøðunum frá Heðini, men politiskt vald skuldi hann ikki fáa. Hann varð ein hóttan ímóti teimum gomlu konservativu og afturhaldsinnaðu kreftunum í flokkinum.

Nú er so úrslitið fyri kommunuvalið 2008 alment, ikki kann sigast annað enn at listi B-Sambandsflokkurin, hevur fingið ein lemjandi dóm. 1150 atkvøður, ið er 11%, og eitt umboð í býráðið í Tórshavnar Kommunu.

Argastu mótstøðufólkini hjá Heðini, tey sum altíð hildu orð, sum ikki lupu frá gjørdum avtalum, vóru moralurin sjálvur og skuldu tryggja Sambandsflokkinum eina bjarta framtíð eru vekk. Beate L. Samuelsen og Høgni Mikkelsen vórðu ikki afturvald, hóast tey fingu 13 á moralsku stigatalvuni.

Nú kann ein so spyrja, hvør vann, og um stríðið aftan á kommunuvalið 2004 ikki hevur kostað Sambandsflokkinum dýrt?

Jú ongin ivi um tað, Heðin Mortensen er sigursharri, og tað at hann vildi í samgongu við Tjóðveldi og við hesum tryggja Sambandsflokkinum bæði borgarstjóran og fleiri týðandi nevndarsessir, var tað rætta valið er onki at ivast í. Hetta vildu Beate og Høgni ikki, tey høvdu lovað Jan Christiansen sín stuðul, hann skuldi verða borgarstjóri og Sambandsflokkurin fekk so at siga einki vald.

Fólkið hevur talað við kommunuvalið í 2008, listi B fekk 11%. Henda afturgongd skyldast persónsstríði og vánaligum politiskum taktikki. Sambandflokkurin manglar profilar og samanhald. Politikum klandri og persónligum stríði hava vit ikki brúk fyri í framtíðini. Skulu vit hava bara eitt nøkulunda kommunuval í 2012, mugu vit standa saman og fylkjast um flokkin serliga í mótgongd.

Málið fyri kommunuvalið 2012 má verða minst 25-30% av atkvøðunum til lista B- Sambandsflokkin, hesum máli røkka vit við at standa saman og draga somu línu.

## Til føroysk fakfeløg

**MASKIN-MEISTARA-FELAGIÐ**

**Viðv. bjargingini av Smyril Line**

**Til føroysk fakfeløg**

Tað hevur verið áhugavert at sæð, hvussu leikur fór nú Smyril Line aftur kom í neyð og støðan var blivin so álvarslig, at annahvørt mátti tað almenna taka um endan, ella fór felagið av knóranum og Norrøna bleiv løgd.

Vit fingu eina áheitan frá Sonju Jógvansdóttir tann 7. november 2008 og svaraðu, at hetta tók Maskinmeistrafelagið ikki støðu til. Vit hevdu ikki stundir til eina nærri frágreiðing, men tað kunnu vit so gera nú. Í hesum sambandi skulu vit vísa til fylgjandi áseting í lóg felagsins:

***§ 1. Endamál og navn felagsins***

*Navn felagsins er Maskinmeistarafelagið við heimstaði í Tórshavn. Felagið er óheft av politikki.*

*Endamál felagsins er:*

- *At røkja áhugamál maskinmeistaranna.*
- *At stuðla skeiðvirksemi, sum kemur limunum til góðar á tøkniligum og yrkisligum økjum, og í samarbeiði við Maskinmeistaraskúlan at veita næmingunum kunnleika um kor maskinmeistaranna og arbeiðið felagsins.*

Vísandi til omanfyri nevndu áseting hevur nevndin í Maskinmeistarafelagnum sostatt ikki heimild til at leggja seg út í politisk mál uttan so, at pkt. 1 ella pkt. 2 í nevndu lógargrein kunnu metast at viga meiri.

Sjóvegis samband við umheimin er ein long søga, sum vit ikki skulu siga so nógv um her, men tá ið hugsað verður um manning av teimum skipum, sum her sigla, so halda vit tað vera áhugavert í føroyskum fakfelagshøpi at vísa á, at eitt tað fyrsta sum var gjørt, tá ið Skipafelagið varð yvirtikið av útlendskum felag, var at koyra føroysku manningarnar til hús. Hesir persónar vóru limir í føroysku manningarfeløgunum og nógvir av teimum høvdu silgt við Skipafelagnum stóran part av sínum sjólívi.

Hvørki hetta nýggja felagið ella hitt útlendska felagið sum siglir upp á Føroyar tykjast vera sinnaði at gjalda tann kostnað, sum er av at brúka føroyska manning við sínum skipum. Hesir reiðarar vilja heldur brúka bíliga útlendska manning, sum ikki er sett eftir føroyskum sáttmálum.

Viðvíkjandi Norrønu hevur støðan verið ein heilt onnur. Okkum kunnugt er øll tann fasta manningin føroysk og verður lønt samsvarandi føroyskum sáttmálum, meðan útlendsk manning bert verður brúkt til tey leysaru størvini og hesi útlendsku sjófólkini eru enntá eisini limir í føroyskum fakfelag og lønt sambært føroyskum sáttmála.

Sæð út frá omanfyri nevnda avgerandi muni á manningarpolitikki hjá teimum útlendsku skipafeløgunum og Smyril Line og havandi endamál Maskinmeistarafelagsins í huga, skuldi ikki verið so trupult at ímyndað sær hvørja støðu nevndin kundi tikið, men við atliti til at talan var um eitt heitt politiskt mál valdi nevndin tó í hesum førinum ikki at úttala seg.

Sum tit síggja, so kann tað eisini hava sínar orsøkir ikki at taka støðu og vit halda, at tað er rætt at kunna onnur fakfeløg um, hvussu vit síggja upp á hetta málið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.